## DAGSINS MEINING

# Álvarslig støða – ST má uppí

Vandi er fyri at stríðið í Miðeystri fer at herast uppaftur meira, nú ísraelskar deildir hava dripið ein av ovastu andaligu leiðarunum hjá tí partinum av palestinum, sum hoyrir til víðgongdu Hamas rørsluna. Morðið verður fordømt av nógvum stjórnarleiðarum og her serliga av fleiri av EU-londunum, sum halda, at Ísrael við at taka hetta stigið, hevur sett enn eina kíla í friðartilgongdina.

Hinvegin verja ísraelar seg við, at Hamas leiðarin persónliga hevur givið boð um hópin av sjálvmorðsatsóknum móti sivilum ísraelum. Tað var Sharon sjálvur, sum gav boðini um morðið. Palestinar lova nú hevnd og siga, at Sharon við hesi gerð hevur latið porturini upp til Helviti.

Fyri okkum, sum bara eru fjasrskotnir eygleiðarar til eina slíka støð, vil tað oftani vera ringt at taka dagar ímillum, hvør nú ber seg rætt at og ikki. Men líta vit kring okkum, so halda leiðarar í fleiri vesturlendskum londum, eitt nú Onglandi og Fraklandi, at Ísrael er farið ov langt. USA hinumegin heldur, at Ísrael má hava møguleika fyri at verja seg móti ágangi og endurtekur, at Hamas er ein terrorfelagsskapur.

Eingin ivi er um, at hetta seinasta morðið á ein leiðandi palestina fer at fáa avleiðingar. Vit kunnu so vænta okkum uppaftur fleiri blóðugar sjálvmorðsatsóknir og tað, sum kanska verri er. Kann tað hugsast, at Al Qeida fer at stuðla palestinum í tess terroratsóknum, ikki bert móti Ísrael men eisini móti teimum, sum stuðla Ísrael! Eftir tað, sum hendi 11. september og tað, sum nú hendi í Madrid, eiga vit at kunna rokna við øllum. Tað er rætt, at vit mugu ikki geva eftir fyri terrorfelagsskapum, men í sama viðfangi eiga vit eisini at gera alt vit eru ment fyri at loysa upp fyri kreppum sum henni í Miðeystri. Spurningurin er um vit gera tað!

Eftir okkara tykki er einasti partur, sum kann gera nakað við hetta málið, nú USA ikki vil ávirka høgrastjórnina í Ísrael nokk til at taka eg aftur av hersettum økjum og geva palestinum meira frælsi, ST. Vit síggja, hvussu eitt nú USA hevur broytt støðutakan til ST í spurninginum um Irak. Fyrst vildi USA halda ST heilt burtur frá gongdini í Irak, men í dag dugur tað at síggja, at bert við ST luttøku ber til at fáa loyst upp fyri trupulleikunum í Irak. Vit kunnu so bara vóna, at tað sama fer at henda við støðuni í Ísrael. Her mugu stórveldini tvinga Ísrael til at góðtaka, at ST fær ein størri leiklut. Nú hevndin er vorðin eitt mál í sær sjálvum og hon fullkomiliga fæstlæsur støðuna, og nú USA heldur fast við sína støðu ikki at blanda seg, so er bara ein møguleiki eftir, og hann er at fáa ST uppí.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lista- og ítróttarskúli við Meginskúlan í Sandoynni

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



Til viðgerðar í dag er løgtingsmál nr. 38/2003. Uppskot til løgtingslóg um at byggja lista- og ítróttarskúla við Meginskúlan í Sandoynni.

Við lógini fær landsstýrismaðurin heimild at byggja skúla, ítróttarhøll og næmingaheim við Meginskúlan í Sandoynni. Lógin gevur landsstýrismanninum heimild í mesta lagi at nýta 39 mió. kr. til byggingina.

Endamálið við lógini er at staðfesta undirtøku tingsins fyri at fremja hesa ætlan, sum umfatar skúla, ítróttarhøll og næmingaheim, sum hevur rúm fyri 40 næmingum.

Um gongdina í málinum er vert at føra fram, at í løgtingslóg nr. 62 frá 9. juni 1988, sum seinni er broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 3. apríl 2001, er ásett bygging av einum skeiðsháskúli á Sandoy. Í 2002 setti landsstýrismaðurin í mentamálum arbeiðsbólk at gera álit um skipan og innihald fyri ein listaskúla í Sandoy.

Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum var, at fimm ymiskar listabreytir vera at velja ímillum á skúlanum, nevniliga myndlist, tónlist, tóvirki og margmiðlalist. Her skal so ein breyt gerast afturat, og verður tað ítróttarbreyt, og haldi eg hetta vera skilagott fyri at víðka um næmingagrundarlagið hjá skúlanum.

Ætlanin er, at skúlin skal skipast á háskúlastøði, tað er sostatt ein skúli, sum ikki endar við próvtøku og gevur soleiðis møguleika fyri eini meira eksperimenterandi undirvísing og einum breiðari næmingagrundarlagi enn annars.

Sum tað framgongur av viðmerkingunum til lógaruppskotið, er ætlanin eisini at byggja næmingaheim og læraraíbúðir, og má hetta metast sum ein fyritreyt fyri, at skúlin skal kunna fáast at virka eftir ætlan.

**Ítróttarhøll í Sandoynni.**
Umframt hetta er tað hent, at Mentamálaráðið hevur givið tilsøgn um stuðul til bygging av ítróttarhøll í Sandoynni, og á fundi í november 2003 millum Annitu á Fríðriksmørk, fyrrverandi mentamálaráðharra, og kommunurnar í Sandoynni, var semja um, at kommunurnar eru sinnaðar at fara inn í eina felags verkætlan millum Føroya lista- og ítróttarskúla um bygging og rakstur av einari ítróttarhøll við tilknýti til skúlan. Sum framgongur av hesum er áhugin sera stórur fyri at víðka um skúlan til eisini at umfata ítróttarbreyt, og kann ein slík verkætlan verða við at menna alla oynna og grundarlagið fyri livilíkindunum har yvirhøvur.

Lista- og ítróttarskúlin í Sandoynni fer at geva eitt fjølbroytt og virðismikið undirvísingartilboð til serliga tey ungu í øllum Føroyum innan list, ítrótt og mentan yvirhøvur, men kann hann eisini virka sum skeiðsdepil við tilboðum til aðrar bólkar í samfelagnum, eitt nú vaksnin menningartarnað og ymiskar áhugafelagsskapir í Føroyum, sum dømi kundu vit nevnt Barnabata, Javna, ítróttarfeløg, Føroya Kommunufelag, Fótbóltssambandið, Hondbóltsambandið bert fyri at nevna nøkur. Her er bert hugflogið og ágrýtni hjá teimum, sum stíla fyri, sum setir mørk.

Sum ein náttúrligur partur av einum slíkum skúla eigur samstarv at fáast í lag við Meginskúlan og ítróttarfelagið í Sandoynni, B 71 og harafturat við alla oynna um mentanarlig, ítróttarlig og listarlig tiltøk fyri borgararnar, soleiðis at lívsdygdin í oynni verður ment.

Til at tryggja at øll áhugamál og krøv til ein slíkan skúla verða røkt, eigur ein faklig nevnd at setast við umboðum úr Ítróttarsambandi Føroya, Listafólkasambandi Føroya og Mentamálaráðnum. Umboð fyri kommunurnar í Sandoynni eiga eisini at vera umboðaðar í eini slíkari nevnd.

Innihaldið í einum tílíkum skúla er væl lýstur í áliti um listaskúla í Sandoy, og eigur landsstýrismaðurin bert at víðka hetta við eini lýsing av innihaldinum á eini ítróttarbreyt afturat. Eisini eigur landsstýrismaðurin beinanvegin at seta eina skjóttarbeiðandi bygginevnd at lýsa hølistørvin á øllum økjum bæði til skúla, ítróttarhøll, næmingabústaðir, lærarabústaðir, sum eisini umfata allar funktiónir, sum hoyra til ein tíðarhóskandi skúla t.d. umsiting, matstovu, bókasavn, leikpalli o.a.

**Menningarætlan og fíggjarkarmar.**
Seta vit lista- og ítróttarskúlan í Sandoynni í eitt breiðari høpi, so er hann ein liður í eini størri menningarætlan Tjóðveldisflokksins av framhaldsskúlum um alt landið. Av Miðnámsskúlum hava vit studentaskúla og handilsskúla í Eysturoy, í Klaksvík hava vit H.F. skeið og Tekniska skúla, og Tjóðveldisflokkurin hevur borið uppskot niðan í tingið um útbygging av hesum skúla. Í Suðuroy er stór verkætlan sett í verk viðvíkjandi byggingini av Miðnámsskúlanum í Vági. Tjóðveldisflokkurin hevur eisini sett bygging av fiskivinnuskúla í Vestmanna á dagsskrá, og verður hetta mál viðgjørt í tinginum fyrsta dagin. Tá ið so uppskotið um skúladepil á Marknagilinum í Havn, sum eisini er ávegis frá Tjóðveldisflokkinum, verður lagt fyri tingið, hava vit bert eitt øki í landinum, ið ikki hevur miðnámsskúla ella háskúla, og tað eru Vágarnar. Tjóðveldisflokkurin fyrireikar í løtuni uppskot um at byggja ein Miðnámsskúla í Vágunum,

*Framhald á næstu síðu*

## Ikki tann rætti Erling

Á hesi síðu í blaðnum í gjár stóð grein, ið Erling Simonsen hevði skrivað. Eisini var mynd av Erlingi Simonsen, fyrrverandi tannlækna.

Men tað var nú kortini ikki tann Erling Simonsen, ið skrivað hevði, men ein navnabróðir hansara.

Umberið mistakið!

**blaðstj.**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 10*

sum hevur ferðavinnu sum høvuðsmál.

Hyggja vit at fíggjarligu karmunum hjá landinum í løtuni, so er ongin ivi hjá Tjóðveldisflokkinum um, at íløgur eiga at verða raðfestar sera høgt. Tá ið virksemið í landinum hevur hug at dala, eiga landsmyndugleikarnir at gera munandi íløgur, fyri at tey náttúrugivnu sveiggini ikki gerast ov ógvuslig fyri samfelagið alt. Eisini verður skúlabyggingin sett á skránna nú íløgurnar í samferðslu hava verið sera stórar seinastu árini, og vit vita øll, at tær 111 mió. kr., sum Smyril kostar í íløgu í ár, ikki vera á fíggjarlógini fyri komandi ár. So okkara meting er avgjørt at halda fram við almennu íløgunum, og at tað nú eru skúlarnir kring landið, sum eiga tørn.

Orsøkirnar, til at vit halda útbyggingar av slíkum miðnámsskúlum og háskúlum kring alt landið, hava so stóran týdning, eru sjálvandi fleiri. Høvuðsorsøkin er, at ein slíkur skúli í roynd og veru kann gerast ein mentanardepil fyri bygdina, alla oynna, ja, alt økið, sum tað er. Skúlin kann gerast tann kveikjari, sum er neyðugur fyri at menna økið og tann íbirtari, sum letur dyrnar upp fyri fólkum í økinum. Hann kann gerast ein tíðandi partur av økismenningini, og tann magnetur, sum dregur yrkisfólk til økið. Alt hetta er við at menna og stimbra bygdina/oynna/økið og lyfta tilverumøguleikarnar runt um í landinum munandi.

**Økismenning.**
Venda vit so aftur til lista- og ítróttarskúlan í Sandoy, er ongin ivi hjá mær um, at hann fer at hava stóran týdning fyri oynna, fyri ungdómin, har býr og allar sandoyingar. Hesin skúli kann eisini vera við at draga fólk, bæði aðrastaðni úr landinum, men eisini úr útlandinum, til sín. Her hugsi eg serliga um børn ella ungfólk hjá føroyskum útisetum. Ein slíkur háskúli kundi verið eitt gott tilboð til føroyskar ungdómar uttanlands, sum hava hug at koma til Føroya at læra seg meira um mál og mentan okkara, og kanska harvið koma nærri sínum uppruna. Eisini verður hetta eitt tilboð hjá útlendingum at uppliva Føroyar á ein øðrvísi hátt.

Ein annar táttur, sum kundi verið áhugaverdur at tikið upp í sambandi við bygging av lista- og ítróttarskúla í Sandoy, var eitt samstarv við Føroya Fólkaháskúla. Ynskiligt hevði verið at fingið í lag samstarv við henda stovn, og fingið nyttu at teimum royndum, vitan og førleika hesin gjøgnum heila øld hevur bygt upp á háskúlaøkinum. Hetta hevði kunnað ment skúlan og kanska givið tað ískoytið av sál, ein slíkur skúli eigur at hava, so eg skjóti upp, at Føroya Fólkaháskúli eisini verður umboðaður í nevndini fyri lista- og ítróttarskúlan í Sandoynni.

Tað er ongin ivi um, at ein slíkur skúli hevði havt ein tíðandi mennandi leiklut í lokalsamfelagnum, tá ið hugsað verður um arbeiðsmøguleikar á einum slíkum skúla. Hugsið bert um, hvussu nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur skulu røkjast, undirvísarar av ymsum slag, bæði lærarar og listafólk, skrivstovufólk, fólk at umsita bygningar, taka sær av matgerð og reingerð fyri at nevna nøkur. Hetta gevur rúmd fyri, at útbúgvið fólk kann búsetast í oynni, og at íbúgvararnir úr nærumhvørvinum fáa víðkað um arbeiðsmøguleikarnar.

Eisini er spurningurin um lestrarstuðul verdur at hava í huga í sambandi við eina slíka verkætlan. Tjóðveldisflokkurin mælir til, at lestrarstuðul verður veittur, og at núverandi lestrarstuðulsskipan verður broytt til eisini at umfata háskúlaskipanir, sum ikki í løtuni eru umfataðar av stuðlinum, tí tær ikki eru førleikagevandi, altso ikki hava próvtøku við á fráfaringarskjalinum.

Uppgávan hjá skúlanum at vera kveikjari á øðrum økjum enn júst lista- og ítróttabreytunum á skúlanum, eru mangar. Fyri at tríva í nakrar skal eg nevna eitt nú at skipast kann fyri styttri ella longri skeiðum fyri ymiskum málbólkum. T.d. ítróttarvenjarum, ítróttarlærararum, lærarum í handverki og list, kommunum og ymsum øðrum áhugabólkum t.d. Meginfelag teirra brekaðu ella undirbólki hjá teimum. Og sum við so nógvum øðrum, tað er bert hugflog og vilji, sum seta mørk.

**Lærugreinirnar.**
Fara vit inn á umrøðu av einstøku lærugreinunum á einum slíkum skúla, so er ætlanin at skipa skúlan við nøkrum valbreytum, har næmingatalið verður ímillum 8 og 12 næmingar á hvørji breyt. Breytirnar eru:

- Myndlist
- Tónlist
- Leiklist
- Tóvirki
- Margmiðlalist
- Ítróttur

So um vit viðgera allar undir einum, so er greitt, at hóskandi er at hava samstarv ímillum lærugreinirnar har felagsøki eru, t.d. listasøga, sniðgeving, litlæra o.s.fr.

Her verða tað sjálvandi yrkislærarar, sum hava undirvísingina um hendi.

Koma vit so til einstøku listagreinina, so er umráðandi, at vit fáa bestu listafólk at taka sær av ávísum pørtum av undirvísingin. Her hugsi eg serliga um, tá ið farast skal undir størri verkætlanir við samstarvi millum fleiri listagreinir. Upplagt er, at skúlaárið endar við eini framførslu, t.d. einum sangleiki, har allar listagreinirnar samstarva um hetta ávísa verkevnið. Ein avbjóðing verður eisini at finna fram til, hvussu ítróttur passar inn í eina tílíka verkætlan, men eisini her er bert hugflog og vilji, sum eru fyritreyt fyri, at tað eydnast.

Ein fastur táttur hjá einum lista- og ítróttarskúla eigur at vera at vitja framsýningar og framførslur, sum eru kring landið. Og her er nóg mikið at fara til, vit hoyra hvønn dag um tiltøk av ymiskum slagi, sjónleikir, tónleikur, málningaframsýningar o.s.fr., men tað týdningarmesta av øllum er eisini at hava sum krav, at ein námferð verður gjørd á hvørjum ári. Hetta eigur at vera ein ferð, har vitjað verður í onkrum størri býi, sum hevur eitt breitt úrval av listagreinum á altjóðaøstøði. Hesin táttur er sera umráðandi at taka upp, fyri at vísa næmingum á menningarmøguleikar uttanlands og fyri at geva føroyskum listarfólki íblástur uttanífrá, og soleiðis vera við at føra okkum inn í ein alheimslistarligan heim. Mítt fyrsta boð upp á ein slíkan mentunarbý er næsti stórbýur okkara London, men eru sjálvandi fleiri aðrir mentanarbýir, sum eru verdir at vitja bæði í og uttan fyri Evropa.

**Niðurstøða.**
So fyri at taka saman um verður skúlin skipaður við seks ymsum breytum, myndlist, tónlist, leiklist, tóvirki, margmiðlalist, ítrótti við hollari, ástøðiligari og praktiskari undirvísing, har høvuðsdenturin verður lagdur á tað skapandi og eksperimenterandi arbeiðið.

Skúlin skal taka støði í føroyskari mentan og list, sum verður sett í víðari perspektiv innan altjóða list, har ein háttur at røkka tí málinum er námsferð til útheimin.

Tær ymsu listabreytirnar samstarva um felagslærugreinir so sum listasøgu og føroyska mentan, lit og formlæra o.s.fr.

Og at enda verður alt ført upp í eina hægri eind við einari felags verkætlan fyri allan skúlan, har møguleiki eisini er at bjóða nærsamfelagnum við til gleði og gagn fyri alt økið. Við vón um góða viðgerð av uppskotinum.

# Viðvíkjandi rættari kunning um útlendsk ítróttarfólk

**Høgni Hoydal**
*Løgtingsmaður*

Munnligur fyrispurningur til Jógvan við Keldu, landsstýrismann viðvíkjandi rættari kunning um avtalu um útlendsk ítróttarfólk í Føroyum

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa um innihaldið í teirri avtalu, sum undanfarna landsstýrið og danski ráðharrin í útlendingamálum vóru komin ásamt um viðvíkjandi arbeiðs- og uppihaldsloyvum í Føroyum?
2. Kann landsstýrismaðurin vátta, at avtalan snúði seg um at herða umsitingarliga mannagongdirnar sum heild fyri at veita arbeiðs- og uppihaldsloyvi, og samstundis at gera eina smidligari og greiðari skipan fyri at avgreiða umsóknir hjá ítróttarfólki?
3. Kann landsstýrismaðurin vátta, at tað altíð hevur verið eitt krav, at fólk skulu hava arbeiði, bústað og váttan fyri, at tey kunnu forsyrgja sær sjálvum, áðrenn arbeiðs- og uppihaldsloyvi verður veitt?

**Viðmerkingar**
Í longri tíð hava vit í fjølmiðlunum hoyrt landsstýrismannin í innlendismálum tosað um reglurnar fyri arbeiðs- og uppihaldsloyvi til ítróttarfólk og til útlendska arbeiðsmegi sum heild.

Sum skilst, vil landsstýrismaðurin hava mannagongdirnar herdar fyri at veita arbeiðs- og uppihaldsloyvir í Føroyum.

Í tí sambandi hevur hann boðað frá, at hann fer ikki at seta ta avtaluna í gildi, sum undanfarna landsstýri gjørdi við danska ráðharran í útlendingamálum, Bertel Haarder.

Landsstýrismaðurin hevur somuleiðis boðað frá, at hann vil hava ta mannagongd, at fólk skulu hava eitt arbeiði, áðrenn tey fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum.

Síðani hevur eitt nú Føroya Arbeiðarafelag hildið uppá, at treytirnar fyri at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi eru linkaðar í Føroyum, og at ítróttarfólk eru ein trupulleiki fyri føroysku arbeiðsmegina.

Spyrjarin skilir snøgt sagt onki av tí, ið higartil er komið fram alment um hetta mál.

Í besta føri er talan um, at landsstýrismaðurin er skeivt endurgivin, ella at ymisk viðurskifti eru komin í bland.

Í ringasta føri er talan um, at beinleiðis skeivir upplýsingar koma frá landsstýrismanninum.

Í fyrsta lagi er tað eitt beinleiðis krav í lógini - og hevur altíð verið tað - at fólk, ið ikki eru norðurlendskir ríkisborgarar, skulu hava arbeiðsgevaraváttan, bústað og/ella váttan fyri, at tey kunnu forsyrgja sær sjálvum, um tey fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum.

Í øðrum lagi snúði avtalan, sum undanfarna landsstýri gjørdi við Bertel Haarder, seg um at herða og tátta í mannagongdirnar fyri at veita arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum sum heild, meðan ein smidlig skipan varð avtalað, um at avgreiða umsóknir hjá ítróttarfólki.

Samanumtikið gjørdi avtalan við Bertel Haarder mannagongdirnar nógv greiðari, enn frammanundan.

Í henni varð staðfest, at ítróttarfólk kunnu koma til Føroya at royndarvenja og síðani søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Tey kundu hava upp í tvey parttíðarstørv afturat ítróttinum og tilsamans skuldu tey hava eina inntøku, ið svarar til eina minstu verkamannaløn í Føroyum.

Tey kundu ikki byrja at spæla ella taka á seg venjarastarv fyrr enn arbeiðs- og uppihaldsloyvi varð avgreitt.

Tey skuldu eins og onnur bert hava uppihaldsloyvi fyri eitt ár í senn, og um tey missa arbeiðið, so fara tey av landinum.

Avtalan gjørdi eisini greitt, at eftirlit skal vera við, útlendsk arbeiðsfólk halda sáttamálakrøvini hjá føroyskum fakfeløgum og at fólk, ið hava roynt at søkja um friðskjól ella uppihald í Danmark, ikki kunnu søkja víðari til Føroya.

Og tað var eftir avtaluni framvegis landsstýrið, ið skuldi viðmæla, um arbeiðsloyvi skal gevast, og landsstýrið hevði sostatt møguleikar fyri at kanna væl og virðiliga, um arbeiðsloysi var í teirri vinnugrein ella í tí øki í landinum, sum søkt varð um arbeiði í.

Avtalan var sostatt bæði ein herðing av mannagongdunum, sum heild, men hon gjørdi samstundis greiðar og smidligar reglur fyri, hvussu ítróttarfólk fáa somu viðferð og somu viðgerð.

Sum støðan er í løtuni, tykist ongin at vita, hvat vendir upp ella niður, og beinleiðis skeivir upplýsingar verða førdir fram alment.

Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi 23. mars 2004

# Fyrilestur á Glyvrum um urtagarðsrøkt

**FYRIELSTUR**
*Tíðindaskriv*

Mikukvøldið 24. mars kl. 20.00 verður fyrilestur í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag á Glyvrum. Tað er Heini Joensen frá Skógrøkt Landsins sum heldur almennan fyrilestur um urtagarðsrøkt.

Fyrilesturin er liður í eini røð av smærri tiltøkum, sum Kongshavnar Kvinnufelag javnan skipar fyri. Seinastu tíðina hevur Kongshavnar Kvinnufelag skipað fyri millum annað fyrilestrum um siðamisbrot, diabetikarar, orð, ið menna, lit- og kostráðgeving. Fyrilesturin um urtagarðsrøkt er seinasti fyrilestur áðrenn summarsteðgin.

Fyrilesturin er ókeypis og Kvinnufelagið bjóðar til ein drekkamunn undir tiltakinum.